# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð
# Bygdarráðsfundur tann 26. januar 2010, kl. 19:00

**Bygdarráðslimir á fundi:** Karl A. Olsen, Herit Magnussen, Pauli T. Petersen, Evelyn Gaard, Jón Mikkelsen, Bárður Poulsen og Siri S. Niclassen
**Skrivari:** Maud Poulsen

---

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 68**
Tilmæli frá Teknisku nevnd um tilboð frá Fa. Jóni Durhuus upp á stoyping av betongdekki og víðkan av opi til portur í nýggja bingjuplássinum í grótbrotinum í Stóragerði.
J.nr. 2009-243

Nevndin mælir til at taka av tilboðnum upp á 297.500 + 12.500 kr. uttan mvg.

**Viðv. 68**
Tilmælið einmælt samtykt.

**Mál 69**
Tilmæli frá Teknisku nevnd um umsókn frá Jens Martin Lamhauge um loyvi at keypa økið ímillum grundstykkið hansara matr. nr. 310e og grannaognina matr. nr. 310 f (Sólrun D. Jacobsen).
J.nr. 2009-236

Nevndin mælir til at selja økið fyri 350,- kr. fermeturin.

**Viðv. 69**
Karl A. Olsen, borgarstjóri, legði fram broytingaruppskot um at selja økið millum matr. nr. 310e og matr. nr. 310f. Tó skal Sólrun D. Jacobsen, eigarin av matr. nr. 310f, fáa tilboð um at keypa helmingin av økinum. Ynskir Sólrun D. Jacobsen ikki at taka av tilboðnum, fær Jens Martin Lamhauge tilboð um at keypa alt økið.
Broytingaruppskotið einmælt samtykt.

**Mál 70**
Tilmæli frá Mentanarnevndini í sambandi við uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan.
J.nr. 2009-242

Nevndin mælir til, at borgarstjórin saman við umsitingini ger skriv til Mentamálaráðið um uppskotið til hoyringar. Víst verður til uppskot dagf. 26. januar 2010.

**Viðv. 70**
Tilmælið einmælt samtykt.

**Mál 71**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini um lántøku í sambandi við bygging av røktarheimi.

Fíggjarnevndin heitir á Bygdarráðið um at heimila fíggjarnevndini at taka av tilboðnum frá LÍV um lánitøku og at gera sáttmála um lánstreytirnar.

**Viðv. 71**
Tilmælið einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundur lokin kl. 20.30.

Sign.:

Karl A. Olsen  Herit Magnussen  Pauli T. Petersen  Jón Mikkelsen

Evelyn Gaard  Siri S. Niclassen  Bárður Poulsen